Tiðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Justinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini

Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Nei til Evropiska Samveldið

Oddagrein

FÓLKAATKVØÐAN í Danmark hósdagin var ikki bert eitt nei til Evruna - til at skifta frá danskari krónu til europeisku krónuna - hon var eisini eitt nei til eitt evropeiskt samveldi eftir amerikanskari uppskrift.

TANN monetera uniónin er ein týðandi brikkur í tí samlaða ES-landakortinum. Og har er so felags gjaldoyra bert ein partur. Eingin ivi er um, at eitt felags gjaldoyra fyri nógv lond er meira praktiskt enn at hvørt landið sær hevur sítt egna gjaldoyra. Men spurningurin mong seta sær er: er hetta endaspurturin til tað lovaða landið, tað evropeiska heimsveldið, sum aftur mong bera so stóran ótta fyri - og sum mong onnur prísa!

HÓAST tað ikki fær nakrar beinleiðis fylgjur fyri evropoeiska gjaldoyrasamstarvið, at 54% av dønum hava atkvøtt ímóti at skifta donsku krónuna út við evruna, tí hetta samstarv fevnir um so mong onnur fíggjarviðurskifti, so er greitt, at hetta kann koma at seta kílar í hesa ætlan sum frálíður. Tí hugsast kann, at lond sum Svoríki og Bretland eisini fara at atkvøða ímóti evruni sum teirra gjaldoyra.

NÚ eru Føroyar ikki limur í ES og ongar ætlanir eru um limaskap í løtuni. Og soleingi hvørki Noreg ella Ísland eru limir har, verða vit tað neyvan heldur. Men spurningurin er, hvørja ávirkan eitt danskt nei hevur á okkum! Neyvan ta stóru ávirkan heldur, tí vit eru framvegis partur av donsku gjaldoyraskipanini.

SPURNINGURIN um evruna er tí kanska meira politiskur enn vit geva okkum fær um. Og tað átti danski forsætisráðharrin kann eisini at havt hugsað meira um. Danir valdu á sinni at fara upp í ES, men teir hava harvið ikki sagt, at teir ynsktu Evropeiska samveldið. Fólkaatkvøðan nú vísir tí nettupp, at danir vilja ikki geva frá sær øll tey rættindi og tær avgerðir, sum í dag verða tiknar á Christiansborg - til parlamentið í ES. Tvs. at teir vilja ikki hava ein felags evropeiskan her, teir vilja ikki lata ES avgera uttanríkspolitikkin osfr. Heilt givið er tað eisini, at danir eisini tengja ta sera vælumtóktu drotningina uppí hetta málið. Og tað at sleppa donsku krónuni kann eisini tulkast sum, at teir vilja halda fast sum tað, sum er danskt og her m.a. danska kongshúsið. Hóast tað at fara frá krónu til evru ikki beinleiðis hevur nakað við hetta at gera, so kann eisini hetta vera ein partur av svarinum til at danir søgdu nei.

JA-kampanjan í Danmark verður av mongum hildin at hava verið sera arrogant, og hetta kann so vera revsingin. At typisk ja-øki hjá Vinstra nú bráddliga eru vorðin nei-øki, merkir eisini, at danir vilja ikki hava meira integratión í ES. Danir hava valt at vera við í ES men ikki fyri einhvønn prís. Teir vilja varðveita Danmark og tað, sum eyðkennir danska demokratiið. Og tað mugu nú bæði Nyrup og Vinstrahøvdingin góðtaka. Tí verður áhugavert at síggja, hvussu leikur nú fer fram.

Sosialurin

Løgmaður skal lúka burt partapolitisk og persónlig álop

Í kjalarvørrinum av nógv umrødda svarinum hjá Tórbjørn Jacobsen, hevur Katrin Dahl Jakobsen biðið løgmann bøta um góðskuna u stjórnarskrivum

EIRIKUR LINDENSKOV

Kartin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna Javnaðarfloksins hevur nú skrivað løgmanni bræv um atburðin hjá landsstýrismanninum í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen. Málið snýr seg um svarið, Tórbjørn Jacobsen gav henni upp á fyrispurning seinasta fríggjadag, tá landsstýrismaðurin í svarinum hartaði Javnaðarflokkin.

Katrin Dahl Jakobsen vísir í brævinum, at hon tann 21. september 2000 sendi formansskapi Løgtingsins bræv fyri at fáa teirra meting av omanfyrinevnda svari. Sjálv heldur hon, at svarið var stak óhøviskt, ósakligt og sum stjórnarskriv als ikki borðbart.

– Til tess at verja okkum øll ímóti, og landsstýrismannin við, at fara undir eitt orðaskifti grundað á so vánaligt tilfar, sum hetta svarið var, heitti eg á formansskapin at senda landsstýrismanninum svarið aftur, ella biða hann svara av nýggjum. Hetta helt eg vera rættast, meðan svarið enn ikki var alment, og tískil eingin hávi hevði staðist av tí, sum bara formansskapurin og eg sjálv vistu um, sigur løgtingskvinnan.

Formansskapur løgtingsins hevur sagt Katrin Dahl Jakobsen, at hann hevur ikki heimildir at gera av, um ein fyrispurningur er nóg væl svaraður. Tað er Løgtingið, sum sigur sína hugsan og møguliga letur slíkt mál fáa avleiðingar. Antin rættarligar avleiðingar við eini ákæru, ella politiskar við einum misáliti.

– Løgtingið hevur undir orðaskiftinum sagt sína hugsan. Tvørtur um floksmørk, samgongu og andstøðu vóru øll, sum vóru við í orðaskiftinum, á einum máli um, at slíkt fara vit ikki lata okkum lynda. Landsstýrismaðurin var tí einsamallur í síni verju av svarinum, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna Javnaðarfloksins, hevur nú skrivað løgmanni bræv um atburðin hjá Tórbjørn Jacobsen í samband við fyrispurning hennara

Fyri ikki at sita á boðunum, og heldur ikki fara so langt, sum at reisa ákæru ella misálit, hevur Katrin Dahl Jakobsen vent sær til løgmann, eftirsum hann eftir § 33, stk.3. í stýriskipanini »hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt«.

– Men hvat er fullgóður háttur? Er tað so, at løgmaður er samdur við tinginum henda dagin, og kann taka undir við, at hetta var so ikki fullgóður háttur, fari eg við hesum at heita á løgmann at bera so í bandi, at stjórnarskriv av hesum slag ikki verða ósaklig svar út í tóman heim. At landsstýrismaðurin, Tórbjørn Jacobsen dugir sær høgv, og at vit framyvir fáa so sáttlig og saklig svar sum møguligt.

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at eins og formansskapurin ansar eftir tignini og tí talaða orðinum á tingi, tykist í hesum einstaka førinum neyðugt at vísa á samsvarandi krøv til skrivaða orðið eisini.

Við brævinum vónar hon, at tað fer at bera løgmanni til at bøta um góðskuna av stjórnarskrivum við at lúka burtur partapolitisk og persónlig álop.

Leigað flogfarið út í tvey ár

EIRIKUR LINDENSKOV

Atlantsflog og British Midland Commuter skrivaðu hósdagin undir nýggjan sáttmála um leigu av flogfari. British Midland leigar eftir hesum sáttmálanum annað flogfarið hjá Atlantsflog fram til 1. juni í 2002. Kortini hevur Atlantsflog tryggjað sær rættin at flúgva við flogfarinum á sumri í 2001, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog í tíðindaskrivi. Og hann sigur seg vera væl nøgdan við sáttmálan.

– Hesin sáttmálin ber í sær, at vit hava tryggjað okkum skilagóðan rakstur við nýggja flogfarinum tey fyrstu trý árini. Harvið er vágin við keypinum av flogfarinum eisini munandi avmarkaður, samstundis sum vit hava fjøltáttað inntøkugrundarlagið hjá felagnum, sigur hann.

Í fyrsa umfari leigaði Atlantsflog flogfarið út sama dag, sum tað varð keypt. Atlantsflog fekk flogfarið heimaftur í juni, og felagið hevur flogið við tí alt summar.

Seinnapartin í august og fram til miðjan september var fyrra flogfarið í dokk og varð málað, og tað tíðarskeiðið røkti Atlantsflog flúgvingina við nýggja flogfarinum.

Bæði flogførini vóru tøk aftur herfyri, og tí hóskaði tað felagnum væl, at sáttmálin kom undir land nú, sigur Magni Arge.

Blandað vælskapt brek

Upptøkurnar til fløguna Vælskapt Brek eru komnar undir land. Ljóðband er farið fram í vikuni og fløgan verður løgd fram um stutta tíð

DAGFINN OLSEN

Jóhannus á Rógvu Joensen hevur staðið fyri at gera fløguætlanina Vælskapt Brek til veruleika. Hann hevur havt nógv um oyruni síðstu dagarnar og í vikuni hevur hann lagt síðstu hond á verkið.

Ein áhugabólkur tók stig til sangkappingina Vælskapt Brek. Endamálið er at varpa ljós á støðu teirra brekaðu og umstøður teirra, eins og hjá avvarðandi.

Undirtøkan var góð millum sangskrivandi føroyingar. Vinnaraløgini vóru 3 í tali, men endaliga úrslitið er ein fløga við 19 av teimum meira enn 80 innkomnu løgunum.

Talan er um eina tónlistarliga sera fjølbroytta fløgu, har mong av navnframastu tónlistafólkunum í Føroyum eru við, eins og fleiri,ið ikki eru so ofta at hoyra

Góðar umstøður

Sigast má, at arbeitt verður undir rímuligum umstøðum. Tær 19 upptøkurnar á fløguni eru gjørdar í Føroyum og í Danmark. Mest í Útvarpinum. Ljóðblandið er farið fram í Media Sound í Keypmannahavn í vikuskiftinum og í vikuni er fløgan mastrað í DanDisc. Jóhannus á Rógvu Joensen hevur staðið fyri upptøkum og ljóðblandinum. Media Sound er stórt og rættiliga væl útgjørt ljóðstudio,ið liggur úti á Amager. Bólkar sum Big Fat Snake og Michael Falck gera vanliga sínar upptøkur har. Men hyggur ein í bandhillarnar, so síggjast eisini bond við t.d. Frændum. Á fløguhillini úti í móttøkuni eru eisini mangar føroyskar fløgur at hóma millum fløgurnar,ið eru framleiddar í hesum hølum.

Ætlanin er, at nýggja fløgan skal liggja á hillunum í Føroyum ein av fyrstu døgunum. Í samband við útgávuna verður ætlandi skipað fyri konsert, men júst nær alt hetta verður, er enn ikki endaliga avgjørt.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum settu dám á gullbrúdleypsdag okkara 26. august. Takk til tykkum øll, sum vaktu okkum við guittara og vøkrum sangi á morgni, og til tykkum mongu, sum gleddust saman við okkum á hátíðardegnum. Takk fyri uppringingar, heilsanir, fjarrit, blómur og gávur. Takk fyri alla hjálp vit fingu, ein serstøk heilsan til børnini, svigarbørn, abba- og ommubørn. Ein ógloymandi og ríkur dagur,ið vil liva í minni okkara.

Heilsan

Sigrid og Jóhan Ziskason

Minni til vørumenning

Minni peningur er settur av til menning av fiskivinnuni á landi komandi ár, enn á verandi fíggjarlóg

Grundin til ætla›u lækkingina á komandi fíggjarlóg er, at minni ver›ur lati› til vørumenning, stendur í vi›merkingunum til fíggjarlógaruppskoti›.

Fiskavirki, sum arbei›a útlendskan fisk ella arbei›a vi› ávísum vørumenningarætlanum, fáa færri pengar frá tí almenna komandi ár, enn tey hava fingi›. Um fíggjarlógaruppskoti› ver›ur samtykt, sum ta› er lagt fram.

Stu›ul kann sambært løgtingslóg latast fiskavirkjum, sum arbei›a innfluttan fisk. Virkjum, sum arbei›a vi› vørumenning, ella virkjum, sum menna innaneftirliti›. Eisini ver›ur játtanin n.tt til at gjalda fyri heilsuprógv hjá starvsfólkum á fiskavirkjum og verksmi›juskipum, ver›ur sagt í vi›merkingunum til fíggjarlógaruppskoti› fyri 2001.

Hesin stu›ul er í verandi fíggjarári 12 milliónir krónur. Hann var í 1999 uppi á 13. 922 milliónum.

Og aftur á komandi fíggjarlóg fer hesin stu›ul til fiskivinnuna á landi at minka, eftir fíggjarlógaruppskotinum at døma. Skoti› er upp, at stu›ulin skal ver›a10,7 milliónir krónur komandi ár.

ej

Meira telefonstu›ul

Langfarasjómenn fáa eina hálva millión meira at tosa heim fyri komandi ár, enn teir hava í ár

Komandi ár fara langfarasjómenn væntandi at tosa í telefon fyri eina hálva millión meira, enn teir gera í ár.

Ta› eru metingarnar á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 undir greinini Telefonstu›ul til langfarasjomenn (Lógarbundin játtan).

Hesin stu›ulin ver›ur sambært løgtingslóg latin sjómonnum vi› bústa›i í Føroyum, sum mynstra›ir eru meira enn 30 dagar.

Á verandi fíggjarlóg er játtanin snøggar tríggjar milliónir krónur.

Á uppskotinum til fíggjarlóg fyri komandi ár er játtanin sett til hálvafjór›u millión krónur.

ej

Flutningsstu›ulin tann sami

Stu›ulin til flutning av fiski innanlands ver›ur tann sami sum higartil

Flutnignsstu›ul til fisk ver›ur latin sambært løgtingslóg frá 1999. Upphæddirnar eru ásettar í kunnger› frá sama ári.

Í ár er játtanin upp á tríggjar milliónir, og ta› ver›ur hon, sambært fíggjarlógaruppskotinum, bæ›i komandi ár og í 2002.

Stu›ulin ver›ur latin til at flyta fisk frá bátum, sum landa á stø›um, har eingin møguleiki er at selja fiskin. Ta› er Lønjavningarstovan, sum umsitir hendan stu›ulin, stendur í vi›merkingunum til fíggjarlógaruppskoti› fyri 2001.

ej

Minni fjølbroyttur floti

Stu›ul til var›veiting av fjølbroyttum flota minkar komandi ár

Eftir uppskotinum til komandi fíggjarlóg minkar stu›ulin til var›veiting av fjølbroyttum fiskiflota rættiliga munandi.

Sambært fíggjarlógaruppskotinum minkar hesin stu›ul komandi ár ni›ur í eina hálva millión. Í ár er hann tríggjar milliónir krónur. Ta› vil siga, at hann minkar ni›ur í ein sættapart komandi ár, um uppskoti› ver›ur samtykt.

Eingin frágrei›ing er tó í vi›merkingunum til fíggjarlógaruppskoti› um, hvat nágreiniliga ver›ur meint vi› var›veiting av fjølbroyttum fiskiflota.

ej

Søgan um fiólspælaran úti í Grønlandi

Frá Hvalbæ til Melbourne

Johannes Andreasen varð føddur í Hvalbæ í 1894. Hann fór til skips í 1908 og í 1911 fór hann á Háskúla í Danmark. Síðan arbeiddi hann í Brugsforeiningini í Hillerød eitt skifti. Í 1914 fór hann til Kristiania (nú Oslo) at søkja sær hýru og fekk tjans við einari finskari, 4 mastraðari bark, til Melbourne í Australien. Ferðin vardi í góðar 4 mánaðir. Komnir vegin fram rýmdi hann í land. Í Melbourne búleikaðist hann í 3 ár.

Fór at spæla violin, men bleiv arresteraður

Í 1917 mynstraði hann við australskun skipi, sum skuldi til U. S. A. Her gjørdi sama nummar sum í Australien; hann rýmdi í land. Fekk kjans við einum sleipibáti í havnini í New York, har hann silgdi í nakrar mánaðir. Johannes flutti síðan til Minneapolis, í Minnesota, har hann helt fram at læra violinspæl, sum hann var byrjaður uppá í Australien. Í 1921 slatraði ein vinmaður fyri mynduleikunum, at hann búði ólógliga í landinum. Johannes bleiv arresteraður og sendur heim aftur til Føroyar.

Framhald á síðu 5

Lørdagspizza 620g, 3 fyri **50,-**

Ísl. Lambsbógvar uml. 2,3kg, fyri kilo **27,95**

Høsnarungar 1100 g, 3 fyri **50,-**

Danbo 45% 1/4 ostur uml. 2 kg, pr. kg. **36,95**

Rynkeby 16 søtar appelsinir 1 ltr. **7,95**

Rynkeby 16 saftig súreplir 1 ltr. **7,95**

Í sambandi við 50 ára føðingardagin, leygardagin 30. september, letur handilin aftur kl. 14.00. Vit lata hurðarnar upp aftur kl 15.00 og bjóða tí móttøku, við ábiti og klassiskum tónleiki, fram til kl. 17.00. Vælkomin

Keypmaðurin "úti í Grønlandi"
Pf. Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16

50 ár

stephanssons hús